

sansir.fo

# Kom við:

# Fólkaheilsurenningin er fyri øll

Í vikuskiftinum verður Fólkaheilsurenning. Øll, ung sum gomul, eru vælkomin at luttaka og longu nú hava nógv fólk meldað seg til renningina, sum verður í Klaksvík leygardagin og í Havn sunnudagin.

Runnið og gingið verður á tveimum teinum. Annar teinurin er 5 kilometrar og hin er 2 kilometrar. Allir luttakarar fáa frukt og okkurt leskiligt at drekka. Eisini fáa luttakararnir endurskinsvest við prenti á til minnis um dagin.

## Klaksvík

**Leygardagin 6. september (byrjar við Badmintonhøllina)**

**13:00** Tilmelding og útflýggjan av startnummur og endurskinsvestum

**13:50** Felags upphiting og stutt kunning um rutuna

**14:00** Sølvi Reinert Hansen, ÍSF-forseti, setur renningina

**15:30** Lutakast

## Tórshavn

Sunnudagin 7. september (byrjar við SMS)

**12:00** Tilmelding og útflýggjan av startnummur og endurskinsvestum

**12:45** Heðin Mortensen ber fram stutta heilsan

**12:50** Felags upphiting og stutt kunning um rutuna

**13:00** Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, setur renningina

**14:30** Lutakast

**Tilmelding**
Tilmelding til renningina í Klaksvík fer fram á www.renn.fo. Freistin at melda seg til er fríggjakvøldið klokkan 22.00 ella við startin klokkan 13.45 leygardagin. Í Havn er eisini møguleiki fyri at melda seg til á Torginum í SMS frá hósdegi til leygardag, umframt á www.renn.fo.

**Startnummar og endurskinsvestur**
**Tórshavn:** Startnummar og endurskinsvestur heintast á Torginum áðrenn leygardagin kl. 16.00 ella 1 tíma innan startin.
**Klaksvík:** Startnummar og endurskinsvestur heintast millum 13.00 og 13.45 í Badmintonhøllini.

Luttøkugjaldið, sum fer óskert til feløgini, er kr. 50 fyri vaksin og kr. 20 fyri børn og skal gjaldast tá startnummar verður avheintað. Øll, sum luttaka, eru við í lutakasti um ymsar vinningar.

Sí annars www.renn.fo fyri nærri kunning.

ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ